## NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

# Hava ikki sæð hvønn annan í yvir 60 ár



*Thorbjørn Lisberg var ein av teimum 250 føroyingum, ið fóru til Íslands í 1941 at gera flogvøll í Reykjavík og hann hevur alt gott at bera teimum, hann var saman við. Nú ætla hesir gomlu íslandsfarararnir at hittast aftur*

**Teir 250 menninir, sum fóru til Íslands at gera flogvøllin í Reykjavík í 1944, ætla nú at hittast aftur. Nú verður leitað eftir monnunum, sum vóru við**

ENDURSAMEINING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tíðliga á sumri 1941 stevndu 250 mans úr øllum Føroyum av Havnini til íslands. Har arbeiddu, ótu og svóvu teir saman í tríggjar mánaðir.

Síðani hava teir ongantíð sær hvønn annan aftur.

Men nú leita hesir gomlu íslandsfarararnir eftir hvørjum øðrum.

Eyðvitað eru fleiri av teimum farnir undir grønu torvu, men nú verður leitað eftir teimum, sum eru eftir.

Eftir øll hesi árini er nú ætlanin at hittast okkurt kvøld at minnast gamlar dagar.

Tað var í mai mánaði í 1941 at Løgtingið lýsti í føroyskum bløðum eftir heili 800 føroyingum at fara til Íslands at arbeiða.

– Ætlanin var at vit skuldu arbeiða upp á veg og annað fyri bretsku hermegina í Íslandi, sigur Thorbjørn Lisberg í Trongisvági, sum er ein av monnunum sum var við í Íslandi.

Hann er eisini ein av teimum, sum nú eftir hesi 64 árini, hevur tikið stig til at savna allar hesar gomlu íslandsfararnar aftur til eitt hugnakvøld.

Lønin, sum hesir menn skuldu fáa, var tann sama, sum íslendskir arbeiðsmenn fingu og tað var 196 íslendsk oyru um tíman.

Men so fingu teir eisini stór tjøld at sova og búleikast í. Matin máttu teir sjálvir betala, men bretska hervaldið hevði kokkarnar til taks.

Ferðin aftur og fram við skipi var ókeypis og teir sum komu av bygd, fingu eisini ókeypis ferðaseðlar til Havnar.

Bara menn í góðum árum úr 20 upp í nøkur og 50 ár kundu søkja og teir skuldu vera fult arbeiðsførir. Áhugaðir skuldu møta í sjónleikarahúsinum í Havn og teir máttu sjálvir hava proviant til ferðina yvir til Íslands og til nakrar dagar afturat.

Hvør maður fekk eisini tvey teppi at hava við til Íslands.

Umframt arbeiðsmenninar, var eisini Joen Rasmussen, løgtingsmaður úr Sørvági við sum alment umboð fyri Føroyar.

Hann hevði eisini ein skrivstovumann við sær umframt Jacob Bernhard Joensen, sum skuldi verða eitt slag av politisti á ferðini - men honum var ongantíð brúk fyri, tí allir samdust avbera væl.

Thorbjørn Lisberg sigur, at hann var staddur í Sumba, tá ið pápi hansara ringdi suður og fortaldi honum, at lýsing hevði staðið í bløðnum, har søkt varð eftir monnum at fara til Íslands.

– Tosað var nógv um hetta og endin var, at Thorbjørn Lisberg søkti, saman við rættiliga nógvum øðrum suðuroyingum.

Tilsamans fóru 250 føroyingar til Íslands í hesum sambandi og teir fóru til Íslands við einum enskum krússara.

Teir loystu frá landi, men vendu aftur og endaði á Skálafjørðinum, har teir lógu í nakrar dagar.

Orsøkin var, at týskarar høvdu søkt stóra, bretska krígsskipið, Hood, í Grønlandsfjørði og av tí sama vóru rættiliga nógv herskip vestan fyri Føroyar.

Teir loystu kortini aftur frá landi nakrar dagar seinni, tá ið tað varð blivið meiri friðaligt og teir komu til Íslands í øllum góðum.

### Gjørdu flogvøll

Í Íslandi skuldu teir gera flogvøllin í Reykjavík størri, tí teir høvdu brúk fyri hann til hernaðarflogfør og tað var hann ov lítil til.

Har vóru hundraðtals arbeiðsmenn, men vit vóru býttir sundur í fleiri lið og har vóru vanliga bæði føroyingar, íslendingar og nakrir onglendingar í hvørjum liði.

Teir búðu allir í tjaldi ímeðan teir vóru í Íslandi, fimm, seks mans í hvørjum tjaldi. Tjaldlegan stóð beint við har, sum Perlan í Reykjavík er nú.

Thorbjørn hevur bara alt gott at bera bretunum, tí teir vóru góðir at arbeiða við.

Á tí eina liðnum vóru so nógvir suðuroyingar, at tað varð bara rópt Suðuroyarliðið.

Thorbjørn minnist at tíðin í Íslandi var góð. Teir arbeiddu nógv, men tá ið teir høvdu frí, plagdu teir at fara inn í býin og serliga væl dámdu teimum at fara í biograf í Reykjavík ella enntá í Havnarfjørði.

Serliga væl minnist Thorbjørn ein eldri ongilskan heryvirmann, sum varð so ógvuliga góður við føroyingarnar - og teir við hann.

– Hetta var ein ógvuliga dámligur og smílandi maður og tá ið vit skuldu fara heimaftur, hevði Niclas Jensen úr Hvalba yrkt ein sang til hendan bretska yvirmannin.

Sangurin var yrktir til lagið á enska tjóðsanginum og hann dugur Thorbjørn uttanat enn. hann ljóðar soleiðis:

*Nu skilles vi fra jer,*
*vi mødes aldrig mere,*
*i verden her.*
*Tak for de minder kær,*
*alt vi har lært af jer*
*vi glemmer aldrig jer,*
*hav tak for alt.*

*Farvel vor ven så god*
*Nu drager við imod,*
*vort fædreland.*
*Når minder strømmer frem,*
*vi tænker tit på Dem,*
*vi glemmer aldrig jer,*
*hav tak for alt.*

Johan Andreas Sunberg úr Vági, var stinnur í enskum, týddi sangin til enskt, so vit sungu hann fyri hesum vældámda, enska yvirmanninum, áðrenn við fóru.

– Tá var hann rørdur, sigur Thorbjørn Lisberg.

Teir komu aftur til Føroya við norska amerikabátinum, Bergensfjord. Tað vóru heili 4000 fólk við úr Íslandi hesa ferðina.

Umframt føroyingarnar og hermenn, var eisini ein týskir krígsfangar við. Talan var um manningina av eimum kavbáti, sum bretar høvdu søkt undir Íslandi.

Teir vóru ikki heilt álviligur við standin og tað varð nógv tosað um vandan frá minum og flogførum.

Tá ið teir sigldu heim, leikaði kríggið á sum harðast og skipini sigldu bølamyrk.

Ætlanin var, at teir skuldi sigla á Havnina. Men tá ið teir nærkaðust Føroyum, óraðu menninir ilt, tí ein norskur yvirmaður spurdi ein av føroyingum, hvat tað var fyri nes, skipið skuldi sigla framvið á veg til Føroyar.

Tá vistu teir, at alt ikki gekk eftir ætlan, tí einasta nes, sum talan kundi vera um, var Mykines.

Og rætt fingu teir, tí teir endaðu í Skotlandi í einum lítlum býi tætt við Glasgow. Har lógu teir aftur í nakrar dagar til eitt annað skip kom eftir teimum og førdi teir heimaftur.

### Ætla at hittast

Nú halda teir, at tað er spell, at hetta brotið í Føroya Søgu skal fara í gloymskuna og tí ætla teir at hittast.

Teir, sum vóru við í Íslandi og hava hug at hitta gomlu starvsfelagar aftur, kunnu ringja til Thorbjørn Lisberg í Trongisvági á telefon 37 11 50 ella við Jákup Michael Mikkelsen á Toftum á telefon 44 74 45.